## Býráðsfundur hósdagin 7. november 2011 kl. 19.30.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Joen Magnus Rasmussen, Fríðgerð Heinesen, Páll Isholm , Svenn Olsen, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen, Tollakur Joensen og Hans Mourits Foldbo

Joen Magnus Rasmussen møtti á fundi kl. 21.45 og var við til viðgerðina av málunum nr. 11

**Fundurin lokin kl. 23.45**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **11/00358**<br>**Umsókn um farloyvi frá Eysturkommunu býráð**<br>Terji Lervig hevur biðið um at farloyvi verður longt til tann 31. desember. 2011. | Einmælt samtykt at ganga umsóknini hjá Terja Lervig á møti. |
| 2. | **11/00383**<br>**Klaga viðv. tónleikamiðstæðini í Valhøll**<br>Grannanir til Valhøll hava sent kommununi skriv viðv. loyvinum Eysturkommuna hevur givið Grót til eina tónleikamiðsøð í Valhøll<br><br>Trivnarnevndin mælir til, at kunnandi fundir verður við grannarnar og tey sum hava víst misnøgd við ætlanina at skipa Valhøll sum Tónleikaramiðstøðina og um framtíðarætlaninnar við Tónleikaramiðstøðini. | Einmælt samtykt at at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini. |
| 3. | **11/00378**<br>**Umsókn um byggiloyvi á matr. nr. 106c í Norðragøtu**<br>Í sambandi við eina langtíðar verkætlan hjá P/F Fiskavirkið ið var send til Gøtu kommunu í 2001, var henda útbygging ikki ein partur av umsóknini. Fiskakvirkið hevur sent umsókn um byggiloyvi til kølirúm og pakkirúm ið er 408 $m^2$ til støddar.<br><br>Teknisk umsiting mælir til at byggiloyvi verður givið.<br><br>Tekniska nevnd mælir til at fylgja tilmælinum frá teknisku umsiting. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd. |

**Býráðsfundur hósdagin 7. november 2011 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Joen Magnus Rasmussen, Fríðgerð Heinesen, Páll Isholm , Svenn Olsen, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen, Tollakur Joensen og Hans Mourits Foldbo

Joen Magnus Rasmussen møtti á fundi kl. 21.45 og var við til viðgerðina av málunum nr. 11

**Fundurin lokin kl. 23.45**

| | | |
|---|---|---|
| **4.** | **11/00332**<br>**Sundurbýti av matr. nr. 11a við Gøtugjógv**<br>Í sambandi við, at Missiónshúsið Bethania við Gøtugjógv ætlar at keypa part av matr. nr. 11a Gøtugjógv (sí hjálagda kort), skal Eysturkommuna ummæla sundurbýti.<br><br>Tekniska nevnd mælir til at Bethania kann keypa henda partin av matrikul nr. 11a. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd.<br><br>*Hans Mourits Foldbo var ikki við í viðgeðini vegna ógegni.* |
| **5.** | **11/00375**<br>**Umsókn um at keypa grundstykki matr. nr. 389ab í Leirvík,**<br>Málið varð fyri á fundi hjá tekniska nevnd tann 19. oktober, og mælti tekniska nevnd tá til at málið bleiv lagt fyri býráðið.<br><br>Málið var fyri í fíggjarnevndini tann 24. oktober. Meirlutin, Jóhan Christiansen og Hans Mourits Foldbo í fíggjarnevndini mælti til, at beina málið afur í teknisku nevnd fyri at fáa málið nærri lýst. Minnilutin, Fríðgerð Heinesen vísti til áður gjørdu býráðssamtykt viðv. gøtuni og at grundstykkið bleiv selt.<br><br>Málið hevur síðani aftur verið fyri á fundi hjá teknisku nevnd tann 2. november 2011, og mælur tekniska nevnd til at leggja sniðgøtuna sambært staðsetingina hjá Selmar Nielsen og at gøtan verður 3,0 metrar breið. Tekniska nevnd mælir eisini til at selja grundstykkið matr. nr. 389ab, tá frábýti til snigøtuna er framt.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at grundstykkið verður selt, og at støðutakan til gøtuna verður tikin á býráðsfundinum. | Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd<br><br>**Atkvøður fyri:**<br>Páll Isholm<br>Jan E. Petersen<br>Jóhan Christiansen<br>Svenn Olsen<br>Hans Mourits Foldbo<br>Tollakur Joensen<br><br>**Atkvøddi ímóti:**<br>Fríðgerð Heinesen<br><br>**Atkvøddi blankt:**<br>Hanna Jensen |

**Býráðsfundur hósdagin 7. november 2011 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Joen Magnus Rasmussen, Fríðgerð Heinesen, Páll Isholm , Svenn Olsen, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen, Tollakur Joensen og Hans Mourits Foldbo

Joen Magnus Rasmussen møtti á fundi kl. 21.45 og var við til viðgerðina av málunum nr. 11

**Fundurin lokin kl. 23.45**

**6. 11/00072**

**Jarðarkeyp til útstykking við Traðará í Syðrugøtu**

Tekniska umsitingin hevur gjørt uppskot til keyp av jørð til útstykking í Syðrugøtu. Uppskotið tekur støði í verkætlanini " Planstrategi fyri Gøtu kommunu " 2007 – 2027.

Keypið kann fíggjast við tí sum er eftir á **konta nr. 6.22.11.510 umframt eini eykajáttan.**

Tekniska nevnd mælir til at keypa matr. nr. 202 og 199 ið er 10.150 + 14.745 $m^2$ , íalt 24.895 $m^2$. Somuleiðis verður mælt til, at keypið av nevndu matriklum, verður fíggja við verandi játtan ið er 700.000,00 kr. og restin verður avsett á fíggjarætlan fyri 2012.

Fíggjarnevndin mælir til at keypa jørð í Syðrugøtu.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd.

**7. 11/00400**

**1.viðgerð av eykajáttan til konto 6.30.41.511 (íløga í kloakkir)**

Um tikið verður undir við málið **nr. 10/00467 (kloakk í Leirvík)** er neyðugt við eykajáttan.

Fíggjarnevndin mælir til at veita eina eykajáttan á kr. 700.000,00

Peningurin verður tikin av innistandandi.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**8. 11/00334**

**1.viðgerð av eykajáttan til skaðar og ábøtur í Gøtubrá**

Í sambandi við at skaði kom á gólvið í Gøtubrá var neyðugt at taka gólvið upp og kanna umstøðurnar. Hetta arbeiði er gjørt og nýggjar gólvplátir eru lagdar á aftur, men gólválegging og arbeiðið

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur hósdagin 7. november 2011 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Joen Magnus Rasmussen, Fríðgerð Heinesen, Páll Isholm , Svenn Olsen, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen, Tollakur Joensen og Hans Mourits Foldbo

Joen Magnus Rasmussen møtti á fundi kl. 21.45 og var við til viðgerðina av málunum nr. 11

**Fundurin lokin kl. 23.45**

millum altanin og gangin er ikki gjørt liðugt.

Umframt omanfyri nevnda arbeiði, hevur Gøtubrá brúk fyri einari turkitrumlu, og fevnir eykajáttanin eisini um keyp av hesum.

Kostnaðurin fyri omanfyri nenvda arbeiði og turkitrumlu er mett til 150.000,00 kr.

Tekniska nevnd mælir til at fáa arbeiðið gjørt.

Fíggjarnevndin mælir til at arbeiðið verður gjørt, og veita eina ein eykajáttan á 150.000,00

Peningurin verður tikin av innistandandi.

**9. 11/00371**

**Víðkan av verandi spæliplássinum við Gøtu skúla**

Tann 24. oktober var lisitatión upp á arbeiði at gera spæliplássið við Gøtu skúla

Tilmæli frá teknisku nevnd og fíggjarnevndini fyriliggja.

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum huðrum*

Einmælt samtykt at undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini, at taka av lægsta tilboðnum á kr. 1.070.760,00 umframt mvg. sum er frá Jógvan Marius Hansen.

**10. 10/00476**

**Kloakk í Leirvík**

Lisitatión var uppá kloakkleiðingar fram við á Bakka í Leirvík (í fjørðuni). Hetta er uppsamling av verandi kloakkleiðingum frá húsunum á Bakka, ið skal leiðast niðan til Kráarvegin sum síðani rennur út á streymasjógv.

Tilmæli frá teknisku nevnd og fíggjarnevndini fyriliggja

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum huðrum*

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini, at taka av lægsta tilboðnum á kr. 890.482,00, umframt mvg, sum er frá RTS/JHR

**Býráðsfundur hósdagin 7. november 2011 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Joen Magnus Rasmussen, Fríðgerð Heinesen, Páll Isholm , Svenn Olsen, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen, Tollakur Joensen og Hans Mourits Foldbo

Joen Magnus Rasmussen møtti á fundi kl. 21.45 og var við til viðgerðina av málunum nr. 11

**Fundurin lokin kl. 23.45**

| | | |
|---|---|---|
| **11.** | **11/00337**<br>**1.viðgerð av fíggjarætlan fyri 2011**<br>Uppskot frá fíggjarnevndini fyriliggur | Einmælt samtykt at arbeiða víðari við málinum. |

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Tollakur Joensen ______________________________

Páll Isholm ______________________________

Joen Magnus Rasmussen ______________________________

Fríðgerð Heinesen ______________________________

Jan Erlingsson Petersen ______________________________

Hans Mourits Foldbo ______________________________

Svenn Olsen ______________________________